# Janus Petersen selt partabrøv í Føroya Banka




Forstjórin í Føroya Banka, Janus Petersen, seldi í gjár meira enn helvtina av sínum partabrøvum í Føroya Banka. Tað segði útvarpið hjá Kringvarpinum í gjárkvøldið. Í fráboðan til keypsskálarnar sigur Føroya Banki, at Janus Petersen hevur selt 22.500 partabrøv í Føroya Banka í keypsskálanum í Reykjavík fyri miðalkursin 160.
Eftir søluna eigur Janus Petersen 15.466 partabrøv eftir í Føroya Banka. Hann hevur sambært hetta selt partabrøv fyri okkurt um 3,6 milliónir krónur. Tá ið Føroya Banki fór á partabrævamarknaðin var kursurin 189, so eftir hesum hevur Janus Petersen mist góðar 650.000 krónur við søluni. Fyri einum mánaði síðan seldi hin stjórin í Føroya Banka, Súni Schwartz Jacobsen, eisini bróðurpartin av sínum partabrøvum í Føroya Banka.



# Standa vit saman klára vit tað

**Ögmundur Jónasson er næstformaður fyri pensjónsgrunninum hjá teimum alment og kommunalt ansettu, ein grunnur, sum hevur millum 300 og 400 milliardir íslendskar krónur, tann størsti í Íslandi**



*Ögmundur Jónsson er altinglimur og fakfelagsmaður, og sum slíkur er hann næstformaður fyri størsta pensjónsgrunninum í Íslandi*

**Reykjavík:** Sum næstformaður fyri hesum grunninum hevur Ögmundur Jónasson eitt týðandi orð at siga, ikki minst nú stjórnin rør upp undir, at grunnurin tekur sínar pengar úr útlendsku plaseringunum og setir teir í íslendska fíggjarkervið.

- Fyri nøkrum døgum síðani tosaðu vit um hetta, at taka peningin heim til Íslands, men so settu vit nakrar harðar treytir við fyri at gera hetta. Millum annað vildu vit vita, hvussu stjórnin ætlaði at nýta hesar pengarnar, sigur Ögmundur Jónasson.

Hann sigur, at íslendsku pensjónsgrunnarnir eru ógvuliga sterkir, og hyggja vit at londunum uttan um okkum, so eru íslendsku pensjónsgrunnarnir sterkari enn til dømis norski oljugrunnurin, vil íslendski politikarin vera við. Og íslendsku pensjónspengarnir verða bert tiknir heim til Íslands, um ávísar treytir verða uppfyltar.

- Tað, sum vit nú kjakast um, er, um íslendsku pensjónsgrunnarnir skulu keypa størsta íslendska bankan, sum er farin av knóranum. Tað er soleiðis, at íslendsku pensjónsgrunnarnir hava mist nógvan pening orsakað av fíggjarkreppuni. Hetta hendir orsakað av kursfalli á partabrævum, sum vit eiga í útlandinum, sigur Ögmundur Jónasson.

Men pensjónsgrunarnir hava eisini mist hópin av peningi, sum teir áttu í íslendsku bankunum.

- Vit áttu pengar í øllum teimum íslendsku bankunum, og høvdu stórar íløgur í bankunum eisini, og roknað verður við, at tað er eitt stað millum 20 og 30% av ognum okkara, sum eru mistar í kreppuni, sigur Ögmundur Jónasson.

Hann vísir kortini á, at tað er jú soleiðis, at kursirnir seinastu árini eru hækkaðir munandi yvir tað heila, og tí mugu tapini, sum koma nú, eisini síggjast í ljósinum av hesum.

## 300 til 400 milliardir

- Men sjálvt um tað ikki sær so gott út í løtuni, so eri eg rættiliga bjartskygdur, tí Íslandski búskapurin í síni heild er sunnur, og um vit ikki høvdu verði so sterkt skuldarbundin seinastu árini av íslendsku bankunum, hevði staðið heilt væl til, sigur Ögmundur Jónasson.

Hann heldur, at so leingi eplini standa í jørðini, og fiskurin svimur í havinum, stendur ikki so illa til.

Enn hava pensjónsgrunnarnir kortini ikki givið stjórnini nøkur lyfti um at flyta sínar pengar til Íslands. Har vilja tey fyrst hava sínar treytir uppfyltar.

- Vit diskuteraðu fyri einari viku síðani, um vit skuldu fara inn við okkara pengum fyri at bjarga bankunum uttanlands, men nú er støðan ein onnur. Nú tosa vit um, hvønn veg vit skulu venda okkum fyri at fáa hjálp. Skal hjálpin koma úr Russlandi, frá IMF ella kanska frá Sveits, tað er spurningurin í løtuni, sigur Ögmundur Jónasson.

Hann sigur, at ognin hjá íslendska pensjónsgrunninum, sum hann er næstformaður fyri, liggur millum 300 og 400 milliardir íslendskar krónur, og er hin størsti pensjónsgrunnurin í Íslandi. Samlað eru ognirnar hjá Íslendskum pensjónsgrunnum 2000 milliardir íslendskar krónur.

Men hóast hann er bjartskygdur um framtíðina, so væntar hann kortini ikki, at kreppan fer av hasa av alt fyri eitt.

- Eg eri bangin fyri, at tað fer at taka nøkur ár, áðrenn alt er komið á rættkjøl aftur. Standa vit saman, so klára vit tað, men tað fer at ganga ein tíð, sigur Ögmundur Jónasson.

## Kapitalisman spælt fallit

Hann dylur heldur ikki fyri, at kreppan fer at seta síni spor og kosta sínar uppsagnir, men fyri hansara egna fakfelag sær kortini ikki so dapurt út.

- Tað er nú einaferð soleiðis, at innan land og kommunur hevur tú størstu trygdina, og væl størri trygd enn innan bankasektorin í løtuni og innan privata vinnulívið. So eg óttist ikki so nógv fyri mínum limum, sum eg óttist fyri teimum, sum eru á tí fría marknaðinum, sigur Ögmundur Jónasson.

Tað verður ein kurur at koma ígjøgnum hjá Íslandi, fyri at koma upp á beinini aftur, og tað skulu heilt nýggir bollar í suppuna.

- Vit verða noyddir til at endurskoða alla politisku skipanina, eins og alt vinnulívið má rannsaka segt sjálvt. Vit mugu endurreisa Ísland eftir heilt øðrum fyritreytum, enn vit hava gjørt fyrr, og tað mugu vit læra av teirri altjóða fíggjarkreppuni, sum herjar í løtuni. Tí hetta er ikki nakað, sum er avmarkað til Ísland. Allur vesturheimurin líðir undir kreppuni, sigur Ögmundur Jónasson.

Hann heldur, at ókontrolleraða kapitalisman megnar ikki eina endurreisn.

- Ókontrolleraða kapitalisman hevur spælt fallit sum samfelagsskipan, og vit verða tí noydd at hugsa heilt av nýggjum á øllum økjum. Eftir at Reagan og Thatcher komu vil valdið, og neo-liberalisman tók seg fram, fóru vit frá lands- og kommunustýring til ein frían marknað, sum skuldi klára alt, sigur Ögmundur Jónasson.

Hann heldur, at vit nú síggja, hvussu kapitalisman hevur stýrt, og hvussu tað ikki ber til at stóla upp ámarknaðarkreftirnar, tá tað kemur til infrastrukturin í samfelagnum.

- Tí má samfelagið varðveita infrastrukturin, heilsuskipanina, útbúgvingarskipanina og aðrar stovnar, sum eiga at verða stýrdir av landinum, sigur Ögmundur Jónasson.

## Grunnar hjálpa

Men íslendingar skulu jú koma víðari, og hóast tað ikki verður lætt, so er vert at leggja sær í geyma, at íslendingar eru í sama potti sum so mong onnur.

- Bankar um allan heim fara á húsagang, og kapitalisman hevur somu trupulleikar aðrastaðni sum her. Men standa vit saman, og koma vit saman gjøgnum kreppuna, so ger tað einki, um víðagitni íslendski stoltleikin fær eitt skot fyri bógvin. Tað týdningarmesta er tó, at vit læra av tí, sum er hent, sigur Ögmundur Jónasson.

Hetta bakkastið, sum Íslandi nú hevur verið fyri, bumbar landið fleiri ár aftur í tíðina.

- Ikki fyri tað, vit líða ikki júst nakra neyð. Hvat so hendir við arbeiðsloysinum er ilt at siga, men tað hevur alstóran tydning, at vit halda so mongum hondum í arbeiði sum gjørligt, og har koma pensjónsgrunnarnir inn í myndina við kapitali fyri at halda vinnulívinum gangandi, sigur Ögmundur Jónasson.

## Rentan niður

Hinvegin ræðist altingsmaðurin ikki so illa stóru inflatónina, tí tað hava tey roynt so ofta fyrr í Íslandi.

- Í 1983 var inflatiónin næstan 100%, og í 1990 millum 20 og 30%. Men tá gjørdu vit eina felags avtalu á øllum arbeiðsmarknaðinum í Íslandi, har tað eydnaðist at fáa inflatiónina niður á 2-3%, og har hevur hon hildið sær stórt sæð síðani, sigur Ögmundur Jónasson.

Sjálvandi verður tað truplari hesaferð, tí nú er tað ikki bert innanlands príshækkingar, sum stríðst verður ímóti, men eisini uttanlands.

- Men fyrst og fremst ræður tað um at standa saman. Vit skulu fyrireika okkum til stórar príshækkingar komandi tíðina, og tað sum er við at henda er, at vit eru í ferð við at lata landið aftur og loysa trupulleikarnar innanlands. Og har ræður tað fyrst og fremst at fáa rentuna niður, tí rentan í Íslandi er sera høg. Síðani tørvar okkum eisini útlendskan valuta, so vit standa væl búgin, tá vit lata landið upp aftur. Men fyrst og fremst mugu vit fáa eina felags avtalu við allan arbeiðsmarknaðin, sigur Ögmundur Jónasson, formaður í Vinstra-grøna flokkinum í Íslandi.